# Dánial Hansen skal spæla við B68

**Ingolf Petersen og Aksel Højgaard skulu hjálpa Peturi Mohr við venjingini hjá B68, sum ikki fer at halda fram við somu útlendingunum**

FYRIREIKINGAR
*Jóannes Hansen*

Hóast tað ikki gekk soleiðis, sum teir høvdu ætlað í ár, so hava teir í B68 ikki givið skarvin yvir. Teir eru farnir undir fyrireikingarnar til nýggja kappingarárið. Vit hava áður nevnt, at Petur Mohr skal vera venjari, og nú er tað greitt, at gomlu B68 spælararnir Ingolf Petersen og Akel Højgaard skulu hjálpa til við venjingini. Teir tríggir skulu taka sær av liðunum í 1. deild, 2. deild og unglingaliðnum. Kjartan Nesá, sum hevur verið hjálparvenjari í fleiri ár, hevur ynskt at sleppa undan hesi uppgávuni komandi ár.

Niclas Davidsen, formaður í B68, sigur, at tað er greitt, at Dánial Hansen skal spæla við B68 komandi kappingarár. Dánial, sum frammanundan bara hevði spælt við NSÍ, hevur í ár spælt við Skála. Eftir summarfrítíðina hevur hann verið nógv plágaður av skaðum, men tað verður heilt víst roknað við, at hann verður førur fyri at spæla við fullari ferð eftir ársskiftið. Dánial hevur verið brúktur í øllum ketunum – síðuspælari, miðverji, miðvallari og álopsspælari.

B68 hevði í ár málverja úr Póllandi, danska álopsspælaran Anders Nygaard og brasiliumenninar Marlon Joreg og Messias Perreira. Tað er greitt, at eingin teirra verður á Toftum komandi ár.

– Vit arbeiða við øðrum møguleikum, men tað er ov tíðliga at siga nakað um hetta enn. Men tað er greitt, at vit fara at geva ungu monnunum hjá okkum sjálvum møguleikan. Unglingaliðið stóð seg væl fram ímóti kappingarenda, og tað verður mett, at fleiri teirra kunnu gera seg galdandi á besta liðnum, sigur Niclas Davidsen.

# Toppdystir í Vestmanna í morgin

**Bæði hjá kvinnum og monnum eru tað FM-biðlar, sum hittast, tá dystir eru millum VÍF og Neistan í Vestmanna í morgin.**

HONDBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Fimm dystir í bestu deildunum í landskappingini í hondbólti verða spældir í morgin. Tveir í Vestmanna, tveir í Runavík og ein í Vestmanna.

Serliga munnu dystirnir í Vestmanna síggja áhugaverdir út, tí hetta eru dystir millum lið, ið mugu roknast sum teirra millum, ið fara at kappast um meistaraheitini í vetur.

Í 1. deild hjá kvinnum er Neistin á odda við trimum stigum, og VÍF er nummar tvey við tveimum stigum - tað sama, sum eisini Kyndil og VB hava.

Neistin vann í fyrsta dystinum á Kyndli, men mátti so nakað óvæntað taka til takkar við javnleiki í Klaksvík móti Stjørnuni fyri viku síðani.

Vestmannakvinnur hava bara spælt tann eina dystin, men hann vunnu tær afturfyri á Tjaldri við ikki færri enn tólv málum.

Í Klaksvík tekur Stjørnan móti Kyndli, og torføri setningurin hjá heimaliðnum verður at prógva, at tað ikki bara var av tilvild, at javnleikurin móti Neistanum varð fingin til høldar.

Kyndil, sum bara hevur tvey stig eftir tveir dystir, skal í sínum lagi syrgja fyri at fáa gongd á, og í útgangsstøðinum er eitt upplagt høvi at royna tað móti liðnum hjá Stjørnuni, sum var um reppið at taka seg úr kappingini í vetur.

Tjaldurskvinnurnar hava ikki fingið nakra ynskibyrjan við tapi móti bæði VÍF og VB, og nú tær møta StÍF, ið heldur einki stig hevur fingið, men tapt stórt móti Kyndli, er spurningurin, um hesin dysturin gevur



eina mynd av botninum í fyrsta umfari.

### VÍF mist tvey stig

Menninir hjá VÍF hildu seg hava fingið tvey stig, tá Tjaldur ikki fekk mannað lið til tann fyrsta dystin í Vestmanna, men nú hevur hondbóltssambandið gjørt av, at dysturin ikki er spældur á skrivaraborðinum, men skal avgreiðast í Vestmanna tann 4. desember.

Tað merkir, at VÍF enn ikki er meira enn nummar trý við teimum báðum stigunum, liðið vann sær móti H71 mikukvøldið. Tey bæði stigini, ið komu til høldar uttan dyst í fyrsta umfarinum, eru sostatt mist - fyribils…

Kortini velja vit at kalla dystin í morgin í Vestmanna millum VÍF og Neistan toppdyst, tí lítið man vera at ivast í, at vestmenningar fara at liggja framvið eftir triðja meistaraheitinum á rað.

Neistin, sum troðkaði seg upp á trúnuna í 2000, er oddalið undan dystinum, og hevur fingið fulla úrtøku móti bæði Kyndli og KÍF. Nú skal oddasessurin verjast, og tí kann tað gerast spennandi í Vestmanna.

Hin mansdysturin verður í Runavík millum Tjaldur og StÍF, og har mugu strandingar metast sum greiðir favorittar, hóast teir frammanundan hava tapt móti Kyndli og vunnið á KÍF.

Tjaldur hevur framvegis smalasta hópin í bestu mansdeildini, meðan breiddin hjá StÍF er, sum hon plagar at vera. Steypavinnararnir síðstu tvey árini skulu gera nógvar stórar »svipsarar«, hava teir ikki tvey stig við sær yvir um fjørðin eftir dystin.

## UEFA stríðist móti rasuskilnaði

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Europeiska fótbóltssamgongan UEFA almannakunngjørdi í gjár eina nýggja ætlan, ið hevur til endamáls at beina fyri øllum rasuskilnaði í fótbólthøpi.

Javnan koma fram skuldsetingar og illgitingar um rasuskilnað av ymsum slagi í sambandi við stóru UEFA-kappingarnar, serliga UEFA Cup-kappingina og Champions League-kappingina, og í síðstuni hevur rasuskilnaðurin stolið yvirskriftirnar í sambandi við fleiri dystir.

Gjarna eru tað áskoðarar, sum undir og kring dystir fremja rasutreytaðan ágang móti spælarum, men eisini er tað meira enn so komið fyri, at spælarar hjá einum liði hava gjørt seg inn á spælara hjá øðrum liði, orsakað av rasumuni.

Hesum trupulleika vil UEFA nú koma til lívs, og tí er løgd ein ætlan í tíggju stigum, ið skal beina fyri rasuskilnaði og øllum ósømiligum atburði á hesum økinum, tá talan er um fótbólt.

Í brævinum, sum UEFA hevur sent øllum sínum limalondum og feløgum, verður sagt, at teir ítøkiligu tilburðir, ið verða kannaðir í løtuni, skaða ta myndina, fótbólturin fegin vil geva av sær sjálvum.

## Sjónvarpið sendir Týsklandsdystin

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*

Tey, ið hava grátið um, at tey ikki skuldu síggja fótbóltslandsliðið spæla stóra dystin í Hannover mikudagin móti Týsklandi, kunnu nú turka tárini!

Tað sá svart út rættiliga leingi, men nú hevur tað eydnast Sjónvarpi Føroya at fáa rættindini til dystin, sum altso verður sendur beinleiðis mikudagin. Sendingin hjá SvF frá dystinum byrjar klokkan 17.15.

Upprunaliga kravið fyri dystin lá um 120.000 krónur, men teir pengarnar átti SvF ikki. Okkum hevur ikki eydnast at fáa at vita, hvør prísurin nú er, men helst er hann dalaður munandi.

# Jan Mølby sekkin í Hull

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*



*Fyrrverandi venjarin hjá Julian Johnsson í Hull City, Jan Mølby, hevur nú fingið sekkin frá felagnum*

Tá Julian Johnsson í juli mánaði vendi heimaftur til føroyskan fótbólt og B36, eftir at hava roynt seg í enska 3. deildarfelagnum Hull City, hevði hann nakrar mánaðir frammanundan fingið nýggjan venjara.

Fyrrverandi danski landsliðsspælarin Jan Mølby tók við starvinum í apríl, og millum annað segði hann seg hava brúk fyri einum spælara sum Julian Johnsson í sínum framtíðarætlanum fyri liðið.

Men í fyrrakvøldið vóru dagarnir hjá Jan Mølby í felagnum taldur, eftir at tað hevur gingið serstakliga illa í landskappingini. Hull City hevur bara vunnið tveir av teimum tólv dystunum higartil, og liðið liggur sum nummar 18 av teimum 24 liðunum í fjórðbestu ensku deildini.

Um støðan so er íkomin, kanska tí Julian fór frá felagnum fyri góðum trimum mánaðum síðani, skulu vit ikki siga, men í øllum førum hevur ikki eydnast Jan Mølby at fáa vind í seglini hetta hálva árið, hann hevur sitið í venjarasessinum.

Sum skilst, bjóðaði Mølby seg fyri viku síðani til at leggja starvið frá sær, men leiðslan í felagnum gav honum tá eina viku aftrat at prógva, at hann kundi betra um støðuna.

Men longu hósdagin - áðrenn nakar dystur hevði verið aftrat - tók leiðslan nýggja avgerð og valdi at loysa Jan Mølby úr starvinum.

Fyrrapartin í gjár varð so Peter Taylor settur í starvið í hansara stað. Hann hevur fyrr vant Leicester, Brighton og enska U21-landsliðið, umframt at hann eitt skifti var fyribils venjari hjá enska A-landsliðnum.



TK Stovan

Ring!
Vit koma

TK Stovan er óheft og veitir ókeypis ráðgeving til føroysku vinnuna.

Vit koma fegin á vitjan, og hjálpa við at kanna tín tørv og tínar menningarmøguleikar. Tú fært greiða kunning um lógir, kunngerðir, fíggjarmøguleikar v.m.

31 73 66
www.tk.fo

TK Stovan
Niels Finsensgøta 37
FO-100 Tórshavn
Fax 319363
www.tk.fo
E-mail tk@tk.fo

VILJI VITAN VØKSTUR

Lærlingur til Telebúðina í Saltangará

"Tað er ikki tí at tað er trupult, at vit ikki tora. Tað er tí at vit ikki tora, at tað er trupult"
Seneca

Søkt verður eftir lærlingi til Telebúðina í Saltangará skjótast gjørligt.

Telebúðin í Saltangará er ein av sjey telebúðum kring landið. Telebúðirnar hava ment seg munandi seinastu árini, og ætlanirnar fyri framtíðina eru stórar. Til handilin í Saltangará søkja vit eftir einum lærlingi, sum skal luttaka í øllum uppgávum, ið skulu til fyri at viðskiftafólkið fær eina góða tænastu.

Til rætta fólkið hava vit eitt sera spennandi lærupláss.

Til læruplássið ynskja vit eitt fólk við:
· førleika at seta seg inn í nýggja tøkni
· evnum at samstarva við ymiskar samstarvsbólkar
· ídni at røkka ásett mál

Lærutíðin er:
· 4 ár uttan útbúgving
· 3 ár við FHS
· 2 ár og 18 vikur við Studentaprógvi, HF ella HT
· 2 ár við HH

Lønin er sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

Telebúðin í Saltangará er opin allar vanligar handilstíðir og arbeitt verður í skiftum við hini starvsfólkini í handlinum.

Gjøllari upplýsingar fáast við at venda sær til Sofus Nielsen á tlf. 40 44 40.

Umsóknir skulu verða Føroya Tele í hendi í seinasta lagi mánadagin 21. oktober 2002 og skulu sendast til

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

FØROYA TELE
Skapið framtíðina saman við okkum!

Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:

Skrásetingar-nr. Sp/f 3444
Navn: Sp/f Stikkan
Adressa: 470 Eiði
Kommuna: Eiði Kommuna
Stovningardato: 01.10.2002
Virkisdato: 01.10.2002
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Morten Mortensen, 470 Eiði
Stjórn: Morten Mortensen, 470 Eiði og Katrin Haraldsen, 470 Eiði
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: Sp/f Grannskoðanarstovan á Skála, 480 Skáli
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 01.10.2002 - 31.12.2003
Endamál: Endamál felagsins er at reka handil, handverk og annað í hesum sambandi.

*Skráseting Føroya tann 10. oktober 2002*

*Kristin Bølle*

www.sosialurin.fo

Tónleikatilboð
IBANEZ
Vanligur prísur 4.590,-
-37%
Avmarkað nøgd
Nú 2.890,-
við guitarposa
ELDING

HOTEL VÁGAR *** THE AIRPORT HOTEL
Ógloymandi
HUGNAKVØLD
18. oktober 2002
Hugnakvøldið byrjar kl.19.30
Dansur frá kl.23.00
Vit stila fyri
luksus menu við 3 rættum
Mótasýning (við Vestmóta og Kallkyn)
Undirhaldi
felagssangi
Dansi
Norska country sangarindan Anita Heggholmen undirheldur og spælur til dans
Dansur 100,-
Eitt ógloymandi kvøld
Fyri alt kvøldið 195,-
Menu
Surprise dessert
møguleiki fyri gisting á 250,-
HOTEL VÁGAR
FLOGFELAG FØROYA • Sørvágur • Tel 332955 • Fax 332310 • T-postur: hotel@ff.fo

Frá Havnar Bóltfelag

Ikki avheintaði atgongumerki til Gull-ársveitsluna leygarkvøldið tann 26. oktober á Hotel Føroyum verða seld í HB-húsinum mánakvøldið 14. og týskvøldið 15. oktober frá kl. 18-20

*Kostnaður 275 kr.*

Havnar Bóltfelag
HB 1904